# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**

Fyrivarni verður tikið fyri villum



**MINI COOPER 1,3**
Árg 2001, Km 26.000. Kr. 75.000. Selist fyri kunda.



**MITSUBISHI CARISMA 1,8GDI**
Árg 1998, Km 112.000. Kr. 75.000



**CITROEN C5 2,2 HDI PRESTIG**
Árg 2001, Km 92.000. Kr. 165.000



**CITROEN XSARA 1.9TD SX 5H**
Árg 1998, Km 120.000. Kr. 90.000. **Sertilboð uttan bil í býti 65.000,-.**



**MITSUBISHI PAJERO 2,8**
Árg 1998, Km 105.000. Kr. 140.000 v/mvg. Selist fyri kunda.



**PEUGEOT 306GTI 170HK 3H**
Árg 1999, Km 175.000. Kr. 90.000

**SKODA FABIA COMBI 1,4I**
Árg 2002, Km 47.000. Kr. 98.000. Selist fyri kunda.



HS539
**CITROEN BERLINGO 1,6I MULTI CLIM**
Árg 2003, Km 19.000. Kr. 115.000 v/Mvg.



JH395
**PEUGEOT PARKNER 1,9 D**
Árg 2000, Km 98.000. Kr. 82.000. Selist fyri kunda.



**SEAT CORDOBA VARIO 1,4**
Árg 1998, Km 97.000. Kr. 65.000.

Ivan Johansen Bilar
Tel 313666 • www.ivan.fo •e-mail: ivan@ivan.fo






## MANNING TIL MÓTTØKUNA

Søkt verður eftir fólki til móttøkuna umborð á Norrønu

Smyril Line sóknast eftir fólki við royndum á høgum altjóða tænastustigi. Tað er krav, at umsøkjararnir duga væl danskt og enskt í skrift og talu og annars hava kunnleika til hini norðurlendsku málini umframt týskt ella onnur fremmandamál. Tað er ein treyst, at móttøkufólkini hava góð samstarvsevni og duga at arbeiða undir trýsti uttan at missa yvirlitið.

Roknast skal við upplæring á skrivstovuni, áðrenn farið verður umborð

**Heilsuprógv fyri sjófólk krevst** (Ikki eldri enn 2 ár).

Tað er ein fyrimunur at hava trygdarskeið (Ikki eldri enn 5 ár).

Smyril Line bjóðar størv í einum umhvørvi við góðum møguleikum fyri persónligari og fakligari menning.

Umsóknir og CV skulu vera okkum í hendi innan 6. februar 2006 og skulu sendast til:

Smyril Line
Manningardeildin
Jónas Broncks gøta 37
Postboks 370
FO-110 Tórshavn

Ella við telduposti til:
crew@smyril-line.fo

Smyril Line varð stovnað í 1982, og í dag selja og marknaðarføra vit Føroyar, Ísland, Noreg, Hetland og Danmark um allan heimin.

Høvuðsskrivstova felagsins er í Tórshavn. Eisini hevur Smyril Line skrivstovur í Hanstholm, Bergen, Reykjavík, Kiel og í Lerwick. Agentar eru í Svøríki, Finnlandi, Týsklandi, Eysturríki, Sveits, Benelux, Fraklandi og Italia.

SMYRIL LINE · J. BRONCKS GØTA 37 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN · TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO · WWW.SMYRIL-LINE.COM



# Betri umstøður til útrórarmenn

**Skopun:** Tey seinnu árini hevur Skopunar Kommuna gjørt sera nógv fyri at betra um umstøðunar hjá teimum mongu útróðrarmonnunum í bygdini.

Týsdagin var enn eitt stig gjørt á hesi leið, tá stoypt var frammanfyri teir nýggju skúranar, sum standa beint við bátahylin í bygdini.

Í hesum skúrum hava útróðrarmenn møguleika at goyma útgerð sína. Hetta kemur helst væl við hjá monnunum, tí streymur er lagdur inn eisini, soleiðis at teir kunnu hava tað heitt og fjált megan klárt verður gjørt til næsta túr.

# Ein góður biti í »Virkinum« á Sandi



*Nú kunnu fólk keypa sær ein góðan bita í »Virkinum« á Sandi, har Erling Arnason ger vælsmakkandi matin*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Síðan í fjør summar hevur Fróði Nolsøe rikið "Multitænastuna" á Sandi**

MATSTOVA
*Beinta K. Jacobsen, starvsnæmingur*

**Sandur:** Tað hevur ikki verið gjørligt fyrr, men nú ber til at keypa sær ein góðan bita í ungmannafelagshúsinum »Virkinum« á Sandi.

Síðani í juni mánaði í fjør hevur Fróði Nolsøe, ið rekur »Multitænustuna« havt eina matstovu í hesum bygningi.

Fyri matgerðini stendur Erling Arnason. Tað er eisini hann, sum er kokkur.

Hann sigur við Sosialin, at tørvur hevur verið á slíkum matstaði.

Sum er, er bert gjørligt at keypa grillmat og slíkt í einum pylsuvogni.

Men nú eru teir so farnir eitt stig longur og bjóða fólki at eta ein góðan bita um vikuskiftini, eitt nú fleiri sløg av búffum.

Matstovan hevur eisini skeinkiloyvi.

Januar mánaði hevur verið heldur slakur í talinum av vitjandi, men okkurt vikuskifti hava verið heilt upp í 60 fólk, sum hava lagt leiðina framvið hesum nýggja matstaðnum heima á Sandi.

Tað eru sjálvandi mest fólk úr Sandoynni, sum hava verið og fingið sær ein betri bita, men Erling Arnason sigur, at fólk úr Havnini eisini eru komin suður higar í hesum ørindum.

– Hetta liggur væl fyri, tí strandfaraskipið »Teistin« siglir av Gomlurætt fleiri ferðir um dagin, sigur hann.

Til ber eisini at sleppa av aftur oynni seint á kvøldi, og tí er hetta eisini eitt gott tilboð til fólk á meginlandinum.